

# Trygdin á donskum oljupallum undir arbeiðseftirlitið

**Jógvan Hugo Gardar**

14.11.2014 - 11:33

Oljan.fo

Frá 1. januar 2015 skal tað sum kallast Offshoresikkerhedenheden í Danmark gerast ein partur av Arbeiðseftirlitinum. Ábyrgdin fyri eindini verður flutt úr orkumálaráðnum til arbeiðsmálaráðið.

Offshoresikkerhedsenheden ehvur ábyrgdina av trygd og heilsu á øllum boripallunum í danska partinum av Norðsjónum.

Energistyrelsen sigur í einum tíðindaskrivi í morgun at orsøkin til at danir nú flyta hesa eindina, er ein lógarbroyting sum er gjørd, ið sigur at tað skal vera óheftni millum tann sum gevur eitt leitiloyvi, og tann myndugleikan sum skal hava eftirlit við trygd og heilsu á pallunum